# Verkini eru enn frísk og djørv

*Røða, ið Signar á Brúnni, landsstýrismaður í mentamálum, helt í sambandi við 100-ára dag William Heinesens*



*Signar á Brúnni, landsstýrismaður* **Mynd: Jens Kristian Vang**

15.01.200)
Nú skipað verður fyri hátíðarhaldi í sambandi við, at hundrað ár eru liðin síðan William Heinesen, mæti rithøvundur okkara, varð borð in í heim, er heitt á meg, vegna landsstýrið, at siga nøkur orð í hesum sambandi. Hetta geri eg fegin og takki samstundis fyri tann heiður, mær við hesum er sýndur.

Sum rithøvundur hevur William Heinesen eina serstøðu í bókaheimi okkara. Hann hevur lagað ein prýðiligan varða av bókmentum, skaldsøgum, yrkingum og greinum, sum vit føroyingar eru sera takksamir fyri.

William hevði tey stóru skaldsligu evni, at hann við penni sínum megnaði at greiða og lýsa fyri okkum hendingar og fólk, tíðarrák og umhvørvi á so greiðan og hugtakandi hátt, at hesi gerast livandi og skiljandi í hugaheimi okkara og gerast partur av tilvitan okkara um tey evni, ið høvdu mestan týdning og áhuga í skaldskapi Williams.

Sagt hevur verið, at í skaldskapi sínum hevur William granskað teir innastu streingirnar í sálarlívinum á fólki og funnið fram og víst á evni og fyribrigdi, sum skapa múruna í okkum, gott og ilt, gaman og álvara og hvørt av sínum.

Um hetta hevur William sjálvur sagt, at hann, tá hann skrivaði, altíð hevði livandi fyrimyndir fyri eyga; men tó ikki á tann hátt, at hann einvegis lýsti ella avdúkaði einstakar persónar. Heldur var tað so, at hann tók eginleikar frá mongum fólkum, ella fyrimyndum, og setti teir saman til ein skaldsøgupersón. Og í veruleikanum var tað so, legði William afturat, at í seinasta enda var tað ofta seg sjálvan, tað djúptøkna skaldið lýsti.

Í sambandi við umrøðu av tílíkum viðurskiftum hevur William endurgivið kendu orð Ibsens: »At digte er at holde dommedag over sig selv«. Hesi orð eru ikki innantómt tos, tí veruligt skald er ikki bert eygleiðari, sálarfrøðingur ella mannakennari; men alt tað, tú hevur fingið innlit í og kunnleika til, stavar í seinasta enda frá sjálvum tær. Sagt á annan hátt: eisini teir ódámligu persónarnir í skaldaverkum tínum hevur tú frá sjálvum tær.

Tí ber eisini til at siga um William, at hann er so reinførur í lýsingum sínum, at hann sigur okkum júst tað, sum hann sær og skilir – uttan at fríðka ella lýta aðaleyðkennini við tí, hann viðgerð og skrivar um. Hetta er galdandi, bæði tá hann lýsir einstakar persónar, bólkar ella eitt nú føroyingar í størri høpi, og hetta gerast vit varug við, tá vit ferð eftir ferð taka fram av hillunum bøkur hansara og lesa okkum av framúrskarandi frásøguhátti og persónslýsingum hansara. Tí hvørja ferð, vit gera hetta, finna vit evni, sum kennast nýggj fyri okkum, tí vit – í víttfevnandi skaldaheimi hansara – ikki hava givið okkum stundir til ella megnað at síggja allar teir marglittu lutir, ið skaldaverk Williams í veruleikanum eru samansett av.

Eingin ivi er í, at ikki bert vit, sum nú liva og í stóran mun eru samtíðarfólk Williams, lesa verk hansara og fegnast um tey, men at eisini komandi ættarliðini fara at ogna sær bøkur hansara. Verk hansara fara at hava varandi týdning, og lív og avrik hansara fara tí at gagna fólki og landi ikki bert nú, men eisini í komandi tíðum. Long tíð er longu liðin, síðani bøkur eftir William Heinesen vórðu umsettar til fremmand mál og gjørdust partur av teimum miklu og tíðandi bókamentadýrgripum, ið eru vorðnar til í mentanarøki vesturheimsins.

Ofta er so, at stórur listamaður er gávaður við fjølbroyttum listarligum evnum. William Heinesen er dømi um mann, ið hevði fleiri streingir á hørpu síni, og tá hann leikar á teir, verða vit drigin inn í heim hansara, har listaligi boðskapur hansara kann verða givin okkum eins væl í orðlist, tónlist og í málningalist.

Um hetta seinasta kann verða sagt, at málningar, tekningar og pappírsklipp Williams hava teirra egna stíl – motivini eru altíð føroysk, og við teimum hevur hann millum annað víst okkum, hvussu stóran tokka hann hevði til tann partin av mentararvi okkara, sum nevndur verður skaldskapur av manna munni.

Eitt nú kemur hetta fram, tá William myndar huldufólk, vættrar, trøll og onnur sagnarfólk og sagnmenni, sum búleikast í føroysku náttúruni. Ofta síggja vit náttúruna lýsta í ævintýradæmi og í litum, sum ljósir, kámir, daprir ella sterkir skapa júst tað huglag, sum sermerkir einstøku myndina – um hon so er um dreingin, sum bangin skundar sær heim í skýmingini, har hvør steinur tykist honum hava fingið andlit og óhugnaverur tykjast hótta hann, ella um ástarparið, ið vónríkt fylgist gjøgnum tjúkt grønt og sevjuríkt gras ta fjálgu summarnáttina í vissu um, at vónrík framtíð liggur fyri teimum.

Í listaheimi Williams tykjast mannakor, tilvera, ævintýrheimur, tað ítøkiliga og tað úrtøkiliga at ganga saman inn í størri heildarhøpi, ið spreingir mørkini fyri tíð, rúmd og stað, og hugflogið reikar ótálmað.

Saman við tónlistini, ið hevði so stóran týdning fyri William alt lívið, og sum hann íðkaði við so miklum áhuga og hegni, myndaðu bókmentirnar og myndlistin tann stóra listamannin og humanistin William Heinesen, sum er kendur so víða um lond, og sum so mong kring heimin heva tikið til sín og virða. Hesi fólk vita, hvaðan William er, og á tann hátt hava tey eisini nomið kunnleika til hetta vakra landið úti í Atlantshavi, sum hann hevur lýst so væl í skaldskapi sínum.

William Heinesen er ikki millum okkum longur; men verk hansara í skaldskapi, tónleiki og málningalist eru enn líka frísk, djørv og sonn. Vit virða minnið um tann mannin, sum gav okkum so nógv, sum kravt var so nógv av, og sum hevði so ríkar gávur, at hann fram um aðrar við list síni lýsti fyri okkum bæði tað álvarsama og tað skemtiliga – eins væl og tað hugtakandi vakra í tilveru einstaka menniskjans bæði sum einstøk vera og í samfelagi við onnur.

At enda fari eg at takka øllum tykkum, sum hava skipað fyri hesum stórfingna tiltaki til minnis um Williams Heinesen á 100-ára degi hansara, samstundis sum eg lýsi hesa framsýning at vera setta.


*Heðin M. Klein* **Mynd: Jens K. Vang**

*Framhald av síðu 8*
kanska loynd, ið ger ongan háva burtur úr sær, sum er skaldsins vón og álit, lívsins súrdeiggj, ja ivaleyst fyritreytin fyri øllum liviligum lívi og lívsins veruliga og sannasta meining. Hin tvífaldi grikski Eros í sínum veldi og í øllum sínum brigdum, sum positiv, sameinandi frummegi og sum holdsliga nærstaddur veruleiki.

Men í førum kann vera neyðugt við sterkari lúti til skurvut høvd. Tá krevst, at tey fólk eru til, sum vilja ikki sættast við tað, ið rangvorðið er. Vilja ilskuni ann! So sum í skaldsøguni *Vónin góð*, sum bregður frá øllum hinum verkum hansara, um Havnina í seinnu helvt av 17.øld, í Gablatíðini, eitt veldugt epos um stríðandi, lívsjáttandi mátt, sum undir trongum umstøðum og mitt í allari neyðini og maktarloysinum bjóðar óndskapinum, fákunnuni og trongskygninum av, eitt epos um tann skroypiliga menniskjaliga aðalin, sum saktans kann farast, men sum altíð, og hvaðna skjótari, kyknar upp aftur av nýggjum.

»Moralisturin,« skrivar William Heinesen í sínum ummæli av skaldsøguni *Men lívið lær* eftir Heðin Brú, »má trúgva tí – at lívið í seinastu syftu vil roynast sámuligt, og at tey berandi lívsvirðini verða í gildi, hvat so enn kundi borið á./ Tann hugsanarsami rithøvundurin – kennir ongan lættgongdan veg til hesa trúgv – Grunn optimisma og lættvunnin kristiligheit stendur honum líka fjart. Men tað, at hesin mótsetningsfulli heimur við síni ofta ófatiligu lagnugongd eisini kann vísa á góðan vilja og ediligar gerðir – er hansara uggi og treysti.« Soleiðis skrivar William Heinesen um Heðin Brú, men eg loyvi mær at halda, at hann sigur ikki sørt um seg sjálvan, so sum ofta er, tá ið høvundar skriva um aðrar. Tað er ikki bara Mortensen magistari í *Glataðu spælimonnunum*, men eisini rithøvundurin William Heinesen, sum má rópa, eftir klerkum, ráðharrum og alskyns kraddarum og krígsøsarum og leggja dýran við, um góðskuna sum einum *livandi veruleika* í mannalívinum.

Av øllum føroyingum, sum av heilum hugi hava givið seg undir listarligt arbeiði, er William Heinesen maðurin við teimum mongu listagávunum. Eingin annar hevur nær náminda verið so margstreingjaður og so fjølbroyttur sum hann. Og tó at hann sigur seg bara hava fingist við, so hevur hann kortini í tónum skapað merkisverd verk av sera ymiskum slag, eitt nú *Norsku løvu* og *Tívilsdøtur*. Øðrvísi er við myndandi list, við tekning, sum frá barnsbeini er partur í hansara gerandisdegi, við málningalist og klipping, sum ymisk tíðarskeið í lívi hansara hava næstan tikið hann heilt. Í list síni sum í skaldskapinum er tað eyðkent fyri hann, at hann stirðnar ikki, men heilt upp í ellina, við leikandi forvitni og ungum eldhugi, roynir seg fram og gevst ikki, fyrr enn hann bókstaviliga misir pennin og saksin úr hondunum. Vit, sum eru um mín aldur og eldri, munnu ongantíð gloyma tekningarnar í lesibókunum, ymiskt íheimligar og fjálgar ella ramligar og ovfarakátar, eitt nú trøllið við teimum sjey høvdunum ella teir veldugu labbarnar á Hanusi í Dímun, sum hekk í longutong í Lítlu Dímun. Og ta dansandi dís, álvagentuna, sum her kemur fevnandi ímóti okkum, vit halda okkum so vist kenna hana aftur onkustaðni. Í føroyskari list hevur William Heinesen, umframt kveikjari og stuðul, eisini verið undangongumaður *á sínum øki*.

### Gávumildur

Men hann var meira enn tað. Hann fylgdi væl við í øllum, sum hendi í føroyskum mentanarlívi, og tekti hann gávur og gróður og listarligt álvara, var hann allastaðni fúsur at stuðla og birta uppundir og leggja aftrat, altíð rúmligur og vælviljandi í orðum og verumáta, tí hann var gávumildur og generøsur móti øðrum listarfólki. Men tað sjálvdyrkandi eksklusiva lá ikki til hansara, og tað mystifiserandi sjálvuppgjørda átti ongan vin í honum. Oftani kemur tað fyri, at hann mælir ímóti og tekur at verja tað, sum hann heldur vera órættvíst ella bara órímiliga viðfarið, og í ummælum og mentanarligum orðadrátti og kjaki er tað meira enn eina ferð William Heinesen, ið sigur tað, sum sigast skal.

### Teknari ella høvundur

Í samrøðum við útlendingar plagdi William Heinesen onkuntíð koksandi at skemta sær við, at hann í Føroyum var nógv kendari sum teknari enn sum rithøvundur. Og tað *var* ikki einki í hesum. Tann stóra fjøldin av føroyingum mundi kenna hann best, ella kanska bara, frá tekningum í lesibókunum og úr teimum mongu jólabløðunum, sum tá vóru, tí hann var altíð lagaligur og beinasamur at heita á. Eg haldi hetta einki gátuført vera, tí tað man vera eitt sindur ivasamt, tá ið samanum kemur, hvussu stívir føroyingar yvirhøvur *eru* í donskum. Vit vita, hvussu takksamur William Heinesen var, at farið varð undir at týða hann til føroyskt, og eingin mundi gleðst sum hann um tær stásiligu bøkur, sum í hesum døgum eru útkomnar, nú eisini er slóðað fyri av álvara, at undirvíst kann vera í hansara skaldskapi á føroyskum. Hetta arbeiðið eigur at halda fram – eisini við nýtýðingum – soleiðis at teir føroyingar sum vilja, kunnu hava umstøður at lesa allan skaldskapin hjá føroyinginum Williami Heinesen á føroyskum.

Tann ungi yrkjarin William Heinesen leitar eftir meining í tilveruni og roynir at lesa sær hana úr stjørnunum. Men honum gerst, sum frá líður, greitt, at eingin uttan hann sjálvur kann sum jarðar búgvi geva eini, at síggja til, meiningsleysari tilveru meining, lív og varma:

Tá hómar tú
í tí hvíta og blómandi
kavafokinum
andlit við góðum munnum,
reikandi verur
ið koma tær ímóti
við blíðum eygum og
opnum ørmum,
konur og børn og kátir vinir,
livandi og deyð
men øll ung og við
sanginum
um framtíð í blóðinum.

Tey eru tú sjálvur
og tú ert tey.

At halda mishopinum burtur. At halda mótinum uppi. At halda mannavirði í æru. Tað gjørdist, sum árini runnu, tað hugspekiliga grundarlagið undir skaldskapinum og lívinum, ikki bara hansara lívi, uttan hjá allari mannaættini. Tí at stjørnuskaldið gamla undir Varða, sum nú var vorðið vísmaður mikil, helt seg vita av egnum royndum, at einki kann koma í staðin, og einki er ímóti hesum eina – at maður av mold fær verið *heima* á jørðini.

*15. januar 2000.*

**Heðin M. Klein**



# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

**Sjálvandi kann ÍtróttarSosialurin eisini lesast á alnetinum: www.sosialurin.fo**

# Kyndilin er ikki slóknaður

*Eftir at hava verið aftanfyri við fimm málum, tá farið varð til hálvleiks, megnaðu kyndilsmenninir kortini at hólva føroyameistararnar av strondum, so enn eiga teir ikki at verða avskrivaðir heilt*

Jákup Mørk

At eitt lið lærir meira av at fáa bank, enn at tapa við einum ella tveimum málum, man besta manslíðið vera eitt sera gott dømi um. Í grundspælinum taptu teir fleiri dystir við minst møguligum marginalum, men eftir at teir viku síðani fingu bank frá neistanum, er rættuliga viðvent í holuni.

Fyrst vóru teir í Vestmanna mikudagin, har teir vunnu fyrru hálvfinaluna í steypakappingini móti oddaliðnum, og sunnudagin vundu teir burtur úr strandingum, sum hava verið í oddinum alt kappingarárið.

### Trygg leiðsla

Fyrstu 30 minuttirnar var tó lítið, sum bendi á, at dysturin skuldi enda við stórsigri til heimaliðið.

Eftir at kyndilsliðið hevði fingið betri byrjanina, vóru tað nenvliga strandingar, sum stýrdu meginpartin av hesum hálvleiki.

Álopsspælið koyrdi á sama skjóta hátt, sum vit so ofta fyrr hava sæð tað, og í verjupartinum vóru teir sera nærlagdir.

Serliga lá væl fyri hjá John Petersen í álopspartinum, meðan Johan Danielsen sýndi fleiri góðar bjargingar í hinum endanum.

Nógvir strandingar vóru komnir til Havnar at fylgja liði teirra, og sum vera man, so var lagið av tí allarbesta, tá StÍF kundi fara til hálvleiks við eini tryggari leiðslu.

### Hamskiftir

Hvat Sophus havði sagt við sínar menn í hálvleikinum, er ilt at vita, men í hvussu so er var kyndilsliðið sum hamskift, nú teir komu aftur á vøllin.

Beinan vegin fóru teir at eta burtur av leiðsluni hjá føroyameistarunum, og hóast StÍF helt framman fyri á máltalvuni, so kom nú rættuliga spenningur í dystin.

Í verjupartinum bardust kyndilsmenninir um hvønn tann einasta bólt, og í álopspartinum var Bjarni Wardum nú vorðin rættuliga heitur.

Eisini var Hans Á. Dahl Christiansen komin á vøllin nú, og hetta viðførdi eisini, at vinstra álopssíða hjá Kyndli gjørdist nógv meira vandamikil, eins og hann er sera sterkur í verjupartinum.

Sum nevnt, so megnaði StÍF so dánt at halda seg framan fyri grøna liðið, men eftir at Marius hevði sent bóltin í netið til 23-21 steðgaði alt fullkomuliga upp hjá strandingum.

Seinastu 15 minuttirnar fingu teir bert eitt mál, og tá kyndilsleikararnir samstundis skoraðu eftir vild, mátti tað enda galið.

Í málinum byrjaði Lars bráddliga at taka alt, sum varð tveitt eftir honum, og hóast Jónleif setti seg sjálvan á vøllin, so megnaði hálvskaddi venjarin ikki at venda skeivu gongdini.

Alt, sum líktist sjálvsálitið, varð so at siga sogið úr føroyameistarunum, og besta dømi um hetta var, tá teir fingu eitt brotsskast tillutað.

John Petersen hevði stutt framman undan brent eina roynd úr teimum sjey metrunum, men kortini vildi Artur hava hann at skjóta. John noktaði tó fyri hesum, og endin var at Artur skeyt…á tvørstongina.

Móti endanum av dystinum var talan um eina rættuliga eyðmýking av strandingum, sum bert tóktist bíða eftir, at seinasta bríkslið skuldi ljóða. Hetta kom tó ikki fyrr enn allir 60 minuttirnir vóru leiktir, og tá vóru kyndilsleikarar og -viðhaldsfólk langt síðani byrja at fegnast um sigurin.


*Bent verður her tikin í eini heldur sjáldsamari atsókn á kyndilsmálið*

**Mynd: Álvur Haraldsen**

### Kann røkkast

Lítið er at ivast í, at sigurin var sera kærkomin hjá kyndilsleikarunum. Verður sæð burtur frá javnleikinum móti vestmenningum á heimavølli, so vóru teir akkurát ov stuttir í øllum dystunum móti hinum oddaliðnum, og tískil gjørdist oddasessurin alt meira veruleikafjarður.

Enn er tó langt eftir á mál, men kortini kann eg ikki lata vera við at hugsa um støðuna fyri einum ári síðani. Tá var líkt til, StÍF als ongan møguleika hevði at vinna meistaraheitið, men við einum ótrúligum endaspurti eydnaðist tað teimum kortini at røkka ovastu tindunum.

Enn er tó langt eftir á mál hjá kyndilsleikarunum, men megna teir framhaldandi at sýna sama spælið, er ikki óhugsandi at teir kunnu taka stig frá bæði Neistanum og VÍF.

Fyrsti møguleikin verður longu mikukvøldið, tá VÍF kemur á vitjan, og megnar Kyndil at vinna sær tvey stig í hesum dysti, verður av sonnum líkt til, at vit aftur í ár fáa eitt sera spennandi endaspæl, har einki verður avgjørt fyrr enn í seinastu dystunum.


*Kyndilsleikararnir vóru nógv meira ágrýtnir, og í eftir at Hans Áki kom á vøllin, fingu teir rættuliga fatur á strandingunum*

**Mynd: Álvur Haraldsen**

### Dysturin í tølum:

**Málskjúttar:**
Kyndil: Bjarnu Wardum 11 (4), Jacob Jónsson 8, Rúni Poulsen 5, Hans Á. D. Christiansen 3 (1), Leivur Holm 2, Regin M. Petersen 2
StÍF: John Petersen 8 (4), Artur Johansen 4, Marius Joensen 4, Alexandur Johansen 3, Sveinbjørn Poulsen 3, Bent Durhuus 1, Karstin Danielsen 1
**Brotskøst:**
Kyndil 6, StÍF 6
**Útvísingar:**
Kyndil 7, StÍF 4
**Diskvalifikatión:**
Kyndil 1 (2x3 minuttir)
**Dómarar úr Neistanum:**
Hjalmar Petersen og Kristian Joahansen